


*Brandur Enni í fínum jólaselskapi í Svøríki*

# Brandur jólaglitrar við svenskum stjørnum

Í NOVEMBER OG DESEMBER FER **BRANDUR ENNI** Á **JÓLAKONSERTFERÐ** SAMAN VIÐ KENDUM **SVENSKUM** ARTISTUM. **BRANDUR** VERÐUR LÝSTUR SUM **»MUSIKUNDERBARNET FRÅN FÄRÖARNA«**



**TÓNLEIKUR**
**Inna Törnroos**
inna@sosialurin.fo

Jólakonsertirnar »Vår jul« verða í ár hildnar fyri 21. ferð. Tað eru kendir sangarar, ið ferðast kring Svøríki um og syngja jólasangir. Í fjør vóru tað bara tríggjar songkvinnur, Sanna Nielsen, Shirley Clamp og Sonja Aldén, men í ár hava tær so Brand Enni, Måns Zelmerlöf og Björn Kjellman við á ferðini.

Tey fimm svensku, sum eru við á konsertferðini, eru sera kend í Svøríki. Sanna Nielsen hevur til dømis verið við í svenska Grand Prixinum ikki minni enn fýra ferðir, og hevur givið seks fløgur út. Shirley Clamp, Sonja Aldén og Måns Zelmerlöf hava eisini luttikið í Grand Prix, og Björn Kjellman er kendur sjónleikari. Tey, sum hava sæð filmin »Adam og Eva« og barnarøðina »Pelle Svanslös«, minnast hann kanska.

Sanna Nielsen og Brandur Enni hava tað til felags, at bæði byrjaðu sína karrieru sum børn. Sanna bleiv kend við lagnum »Till en fågel« sum 11-ára gomul.

Brandur verður lýstur sum »musikunderbarnet från Färöarna« – umsett verður tað *tónleikaundrið úr Føroyum.* Sanna Nielsen segði soleiðis um Brand í eini samrøðu við bladið »Allehanda«:

– Tá Brandur tók gittaran fram og spældi fyri okkum, gjørdust vit trøllabundin og hugsaðu, at hetta má alt Svøríki hoyra.

Jólakonsertirnar byrja 25. november í Gävle og enda 20. desember í Stockholm. 23 konsertir verða tilsamans.

– Eg eri sera spentur - hetta er fyrsta rættuliga konsertferð hjá mær, sigur Brandur Enni.

Brandur fer at syngja einar tríggjar ella fýra sangir, og ein av teimum verður persónligi favoritturin hjá honum, »O helga natt«.

Fert tú at syngja nakran sang á føroyskum?

– Ja, eg ætli mær at syngja ein sang á føroyskum. Havi ikki rættuliga avgjørt enn, hvør tað verður, sigur Brandur.

Aðrir kendir sangarar, ið hava luttikið í hesi jólakonsertferð, eru til dømis Sissel Kyrkjebö, Lill Lindfors, Lasse Berghagen og Elisabeth Andreassen.

## INNIHALD

2 KLUMMA: **SJÓRÆNARAR, HOMOFOBAR OG TAPARAR**
4 SAMRØÐA: **ULRIK HAAGERUP**
6 TIPS: **BLONDUR**
8 TIL ARBEIÐIS: **CHARLOTTE ELLENDERSEN**
10 10 TING UM **MEDINA**
11 90 SEKUND: **BARBARA Á TJALDRAFLØTTI**
12 BAKGRUND: **SVENSKA VALIÐ**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 KRONIKK: **VÍÐGONGD MANNMINKAN ELLA ALTJÓÐA MANNARÆTTINDI**
18 ÚTISETIN: **ELIN KJETLAND**
19 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
24 VIKUMYNDIN: **GEORGE MICHAEL**

## KLUMMAN



*Eyðun Klakstein*

# Sjórænarar, homofobar og taparar

Hetta hevur verið eitt óført summar fyri Føroyar úti í heimi.

Sjáldan hava vit havt so nógvar yvirskriftir um okkum í útlendskum miðlum, sum júst hetta summarið. Vit hava rokkið kring alt Europa, til India og Japan, til Kanada og USA og eisini til miðeystur upp til fleiri ferðir.

Vit vilja jú so gjarna verða kend uttanlands, og vit føroyingar vita jú væl, at vit eru ein væl upplýst, útbúgvin og siðilig tjóð, sum kann drekka coco-choko-café-latté á café, eta sushi á matstovu og smakka dýrabarastu føroysku matmentanina í hvørjum króki í landinum. Vit ganga til listaframsýningar, konsertir, móttøkur og á festivalar. Vit røgva út, egna, fletta, fleyga og hoyggja. Vit lurta eftir røðum, kjakast og skemta okkum.

Men hvat er tað, sum vit í summar eru blivin kend fyri uttanlands.

Jú, vit verða kallað sjórænarar, homofobar, barbarar og taparar.

Sjórænarar, tí vit hava ásett okkum eginkvotu av makreli, og tað eru grannarnir í øðini um.

Homofobar, tí ein politikari ikki skoytti um at eta saman við einum samkyndum statsleiðara á vitjan í Føroyum.

Barbarar, tí vit slakta smáar og stórar grindahvalir í blóðugum drápum á fírðum og vágum.

Og taparar, tí vit megna lítið millum stóru fótbóltstjóðirnar, sum vit dystast við.

Hissini heimligar ætlanir um taka heimin við marknaðarføring – branding – av Føroyum hava ongan kjans, tá ið stóru útlendsku miðlarnir koyra Føroyar í yvirskriftirnar. Tá verður okkara marknaðarførings-jolla tikin av eini tsunami-aldu.

Øll umrøða er góð umrøða verður sagt. Og lat okkum bara vóna tað.

Í løtuni eru vit so kend fyri at elska grind meira enn samkynd.

Og at vinna meira í makrelfiskiskapi enn í fótbóltsdystum.

Vit – sjórænarar, homofobar, barbarar og taparar.

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Ulrik Haagerup / Polfoto